

*Jóhannes Viðar Bjarnason og Gunnar Christiansen, ið leggja tilrættis víkingatiltøk, ið føroyingar kunnu fáa gleði av*

***Mynd: Jens Kristian Vang***

# Víkingar hittast

*Í Íslandi er forvitnisligt stað við matstovu og øðrum í serstøkum stíli. Vanliga eru eisini víkingaveitslur har. Nú verður eisini ein smiðja bygd og m.a. fáa føroyskir listhandverkarar møguleika at vísa síni kynstur*

DAGFINN OLSEN

Í Hafnafirði í Íslandi er forvitnisliga staðið Fjørukráin. Hetta er matstað, ið er bygt í serstøkum sniði.

Sera nógv ferðafólk leggja leiðina framvið lokkandi staðnum.

Fyri góðum ári síðani fór stigtakarin, Jóhannes Viðar Bjarnason, undir at hava víkingaveitslur. Hetta er vælumtókt tiltak. Nú verður farið undir at hava eina smiðju eisini, har listafólk




kunnu sita og evna til sínar handverkslutir.

Ætlanin er at fáa í lag samstarv millum Føroyar, Grønland og Ísland. Mong minnast óivað víkingadagarnar í Hoyvík í fjør. Ætlandi skal slíkt tiltak ferðast millum londini.

Í smiðjuni verður eisini rúm fyri listarfólkunum, so tey kunnu gista. Hetta kann eittnú eisini koma ítróttarfólki og tónleikarum til góða. Rúm er fyri eini 30 í senn.

Á henda hátt verður møguleiki hjá føroyskum handverkarum, ið evna prýðislutir og annað, at koma útum landoddarnar við listini, sigur Gunnar Christiansen, sum hevur búð í Íslandi seinnu árini og har hevur skipað fyri ymsum føroyskum tiltøkum.

Ingigerð á Trøðni á Kunningarstovuni sigur, at á henda hátt ber eisini til at røkka ferðafólk, so tey verða kunnaði um Føroyar.

Jóhannes Viðar Bjarnason og Gunnar Christiansen hava saman við Ingigerð á Trøðni havt fundir við ymisk fólk, ið møguliga hava áhuga í at luttaka í slíkari ætlan og sum kanska kunnu stuðla fíggjarliga.

Í juni í ár, dagin fyri íslendska tjóðdagin, er ætlanin at hava víkingastevnu. Tá verður smiðjan tikin í nýtslu og ætlandi verða eini tveir føroyskir listhandverkarar við. Møguliga fara íslendski forsetin og løgmaður at luttaka og eisini umboð fyri grønlendska landsstýrið.

Sosialurin fer í eini grein seinni at greiða nærri frá víkingaætlanunum í Hafnafirði

## Kirsten og Eivind í Smiðjuni

*Um páskirnar og eftir páskir fara Kirsten Mørup Jeppesen og Eivindur í Gongini at sýna fram*



Hálvi kvívíkingurin Kirsten M. Jeppesen letur í dag klokkan 14 upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Á Billedskolen í Danmark hevur hon samstarvað við Eivind í Gongini, ið hevur eggjað henni til at sýna fram í Føroyum.



Kirsten sigur, at hon hevur 30 oljumyndir við og at hon kemur hendaveg fyri at kenna tað, ið hevur verið ein partur av henni síðani barnaárini, tá hon javnan vitjaði í Kvívík, haðani mamma hennara er.

Kirsten M. Jeppesen býr í Kvívík, nú hon vitjar, og gleðir hon seg til at uppliva náttúruna.

Íblástur til myndir sínar fær hon úr náttúruni, fólkalívinum og hugsanum. Ikki altíð hvør sær. Í síðstuni hevur hon verið hugtikin av løgum. Tey mongu løg, ið verða løgd yvir okkara meiningar. Hesi løg hevur hon í myndum sínum roynt at tikið burt, men um tað er eydnast veit hon ikki. Kanka hevur hon bert lagt afturat.

Kirsten letur sína sýning upp í dag klokkan 14. Hon sýnir fram til flaggdagin, 25. apríl, klokkan 14, tí tá sleppur Eivindur í Gongini at sýna sínar myndir fram.

Eivindur arbeiðir við grafikki og tað er gamla Havnin, ið er myndevnið.

Bæði Kirsten og Eivindur hava opið frá klokkan 14 til 18 hvønn dag.

*- do -*

# Fíggjarmálastýrið góðtók

Tíðindaskriv: Fíggjarmálastýrið hevur í dag góðkent og undirskrivað semingsuppskot um nýggjan trýára sáttmála við Føroya Lærarafelag.

Hóast semingsuppskotið ikki gevur ta rúmd, sum Fíggjarmálastýrið hevur miðað eftir, og hóast uppskotið hjá Fíggjarmálastýrinum um árvserk ikki er fylgt, so hava Fíggjarmálastýrið og Undirvísingar- og Mentamálastýrið valt at toyggja seg langt fyri at fáa semju.

Seinastu trý samdøgrini hava umboð fyri Fíggjarmálastýrið, Undirvísingar- og Mentamálastýrið umframt landsstýrismenninir í fíggjarmálum og í undirvísingar- og mentamálum sitið út í eitt til tess at finna semju við Lærarafelagið saman við semingsmonnunum, ið hava gjørt eitt dygdargott arbeiði. Í semingsroyndunum hava landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum lagt stóran dent á at greiða viðurskiftini og at leggja karmarnar fyri tryggum viðurskiftum frameftir í fólkaskúlanum.

Fleiri nýggj viðurskifti eru í nýggja sáttmálanum, sum er skotin upp í semingsuppskotinum:

• Sáttmálin gevur lærarum eina lønarhækkan uppá tilsamans 9% yvir trý ár.

• Hartil er semja gjørd um eina nýggja avtalu um arbeiðstíð hjá lærarum, sum fær gildi frá 1. august 2001.

Henda avtala er ein liðilig skipan, har árliga arbeiðstíðin hjá lærarum verður ásett í skúlatíð, einstaklingstíð og menningartíð. Sambært avtaluni skulu Føroya Lærarafelag og Undirvísingar- og Mentamálastýrið nú undan hvørjum skúlaári avtala neyðugar leiðreglur fyri tíðarnýtslu og raðfestingar til ymiska virksemið í fólkaskúlanum. Við støði í hesum, skulu leiðslurnar og lærararnir á einstøku skúlunum raðfesta neyðugu tíðina og orkuna til skúlans virksemi. Sostatt fær einstaki skúlin munandi størri ábyrgd fyri at røkka teimum málum, ið verða sett fyri undirvísing og øðrum virksemi í fólkaskúlanum, saman við næmingum og skúlanevndum/skúlastýrum.

• Áðrenn nýggja arbeiðstíðaravtalan fær gildi frá 1. august 2001, er avtalað ein skiftistíð, har tíð og orka verða sett til ráðlegging, leiðslu, telduvørðar og ávísar aðrar uppgávur í fólkaskúlanum.

Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum fer undir at gera eina »koyriætlan« fyri, hvussu tættirnir í nýggju fólkaskúlalógini kunnu setast í verk og fáast at virka til fulnar komandi árini. Hetta verður gjørt saman við Føroya Lærarafelag í sambandi við at avtala leiðreglurnar fyri arbeiðstíð og tíðarkørmum sambært nýggju avtaluni. Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum hevur ábyrgdina mótvegis løgtinginum fyri, at samsvar er millum ígongdsett virksemið og játtanir fólkaskúlans, og skal gera neyðugu raðfestingarnar til tess at tryggja hetta samsvar.

Nýggja avtalan víðkar somuleiðis um undirvísingarhugtakið soleiðis, at undirvísing ikki bert er tað, sum fer fram í flokshølunum, men alt virksemi, ið verður lagt til rættis til tess at geva næmingunum neyðugan førleika — eisini uttan fyri skúlans øki. Hetta samsvarar væl við endamálini í nýggju fólkaskúlalógini. Avtalan er sostatt besta amboðið til tess at tryggja, at neyvt samsvar verður millum verksetan av nýggjum uppgávum og neyðugu arbeiðsumstøðurnar hjá lærarum og skúlaleiðslum at fáa endamálini framd.

Fíggjarmálastýrið og Undirvísingar- og Mentamálastýrið vóna, at hetta semingsuppskot fer at leggja nýggjar karmar, ið kunnu fáa fólkaskúlan aftur at virka til fulnar - til gagns fyri næmingar, foreldur, avvarðandi og starvsfólkini á skúlunum.

Landsstýrismenninir vilja gera sítt til at tryggja, at ta samstarv og álit, ið krevst, fyri at útinna avtaluna í semingsuppskotinum, verður bygt og framt til fulnar.

*Tórshavn 15. apríl 2000*

**Karsten Hansen,**
landsstýrismaður

**Høgni Hoydal,**
Landsstýrismaður

# Ivasamt við frumatkvøðuni

*Føroya Lærarafelag skipaði í gjár fyri limafundi í Norðurlandahúsinum. Ivasamt var innan fundin, um frumatkvøða um semingsuppskotið kom á skránna*

DAGFINN OLSEN

Tað eydnaðist semingsmonnunum leygardagin at koma fram til eitt semingsuppskot. Tá høvdu teir havt partarnar, Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, á Hotel Føroyum síðani mikudag seinnapart.

Fíggjarmálastýrið góðtók semingsuppskotið, meðan Føroya Lærarafelag tryggjaði sær rætt at leggja tað fyri limirnar til frumatkvøðu.

Lýst var til limafundar í gjár seinnapart og møguliga skuldi frumatkvøða verða um semingsuppskotið.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen, segði tó áðrenn fundin, at tað als ikki var avgjørt, hvørt frumatkvøða kom á skránna ella ikki.

Stórt meira vildi hon ikki siga undan fundinum. Heldur ikki, um ein møgulig forðing fyri atkvøðuni kundi verða, at ov fá møttu á fundi.

Men hon legði tó dent á, at ein frumatkvøða av røttum er, tá uppskotið verður sent út til limirnar - við posti - og síðani savara hesir.

Elsa Birgitta Petersen segði undan fundinum, at talan var um limafund, har felagið kunnaði limirnar um semingsuppskotið. Hvat annað fór at henda á fundinum fór at vísa seg, metti forkvinnan í Føroya Lærarafelag.

Verður ikki frumatkvøða nú, so má bíðast til eftir páskir, tí eingin postútbering er aftur, fyrr enn tá.









**Vælumtókta H-vindeyga í nýggjum búna**

Nýggja H-vindeyga, ið er klætt við aluminium á útsíðuni, gevur framúr viðlíkahalds fyrimunir, samstundis sum umhvørvi og trivnaður innandura verður gingin á møti við límtræði. Nú kanst tú eisini velja millum topp- ella síðusving vindeygu, ið kunnu snarast runt, so tey eru løtt at vaska.

Vindeygað verður liðugt viðgjørt - lakk-sproytað - bæði innan og uttan, síðan verður tað klætt við aluminium í tí liti, tær dámar best.

Ring á 33 21 77 og bið om brochuru og legg summarfrítíðina til rættis!

10 ára trygd

**Vatnsoyra** Snikkaravirki pf.

www.h-window.fo

stephanssons hús